NORÐOYA
SPARIKASSI

# ESG-FRÁGREIÐING 2023



# INNIHALDSYVIRLIT

TABLE OF CONTENTS


**Um Norðoya Sparikassa / About** .......... 3
Fuglafjørður • Tórshavn • Klaksvík • Norðoya Sparikassi

**Umhvørvi / Environmental** .......... 4
Grøna kósin hjá Sparikassanum

**Sosialt / Social** .......... 5
Starvsfólk • Kundar • Okkara tænastur á grønu leiðini
• Grønt bústaðarlán • Orkulán • Elbillán • Gongdin í 2023
• Nærsamfelagið • Latin stuðul
• Dømi um gávur og tiltøk í Føroyum

**Leiðsla / Governance** .......... 14
Álítandi virkisleiðsla • Fyristøða Sparikassans • Ábyrgdarar
• Umboðsráðið og Umboðsráðsfundur • Nevndin
• Tilráðingarnevndin • Fyristøða hjá Norðoya Sparikassa • Stjórn
• Hvítting og whistle-blower-skipan

**ESG-lyklatøl / ESG Key Figures** .......... 18
Høvuðsdeildin • Deildin í Fuglafirði • Deildin í Tórshavn


# UM NORÐOYA SPARIKASSA

ABOUT

Norðoya Sparikassi er ein ábyrgdarsparikassi og er sostatt ein sjálvsognarstovnur. Hetta merkir, at tað eru kundar okkara, ið hava sett pening í Norðoya Sparikassa og standa sum ábyrgdarar fyri Sparikassan.

Sum ábyrgdarasparikassi eru ongir partaeigarar, ið skulu hava lut í yvirskotinum. Hetta gevur okkum størri rásarúm til at gera mun í nærsamfelagnum, har vit m.a. stuðla felagsskapum, feløgum og mentan.

Vit eru her fyri okkara kundar og nærsamfelagið og hava lagt okkara virksemi soleiðis til rættis, at vit vilja gera mun í føroyska samfelagnum við at veita fíggjarligar tænastur til privat og vinnurekandi. Eisini vilja vit vera við til at styrkja um møguleikan at búgva og virka í egnum nærumhvørvi.




Norðoya Sparikassi

Einasti ábyrgdara peningastovnur í landinum

**Stovnaður:** 24. september 1919

*Føroya elsti peningastovnur*

**Høvuðssæti:** Ósávegur 1, Klaksvík

**Starvsfólk:** Umleið 50

**Deildir:** 3

# UMHVØRVIÐ
## ENVIRONMENTAL

Norðoya Sparikassi hevur sett sær sum mál at fáa greiðu á okkara umhvørvisfótaspori í allari virðisketuni.

Í 2022 settu vit skjøtil á at rokna okkara egna útlát frá beinleiðis virksemi, ið fevnir um olju- og el-nýtslu frá bilum og bygningum hjá Sparikassanum. Hetta útlátið verður bólkað sum vav 1 og vav 2.

Arbeiðið við at greina vav 3 er farið í gongd, og er hetta eitt stórt arbeiði, ið væntast at taka drúgva tíð, áðrenn komið er á mál. Vav 3 kann deilast upp í 15 bólkar, og væntast hesir at standa fyri umleið 98 % av øllum útlátinum hjá Sparikassanum.

Ein av afturvendandi avbjóðingunum við vavi 3, er at tað vanta neyvar dátur til uppgerðina.

### Grøna kósin hjá Sparikassanum

Norðoya Sparikassi hevur í 2022 skift takið á høvuðsbygninginum. Nýggja tekjan er úr skifer, sum er ein umhvørvisvinarlig natúrvøra við sera góðum haldbæri. Samstundis er loftið betur bjálvað, og er bygningurin blivin munandi minni orkukrevjandi.

Við ársbyrjan 2023 varð høvuðsbygningurin somuleiðis knýttur í sjóhitaskipanna hjá Klaksvíkar kommunu, og við ársenda varð nærgoymslan á Ósávegi 7 løgd um til eina luft-til-vatn hitaskipan.

Hesar dagføringar hava havt við sær, at orkunýtslan er minkað úr 2.034 GJ niður í 1.568 GJ, ið svarar til eina minking upp á 466 GJ. Í $CO_2$-útláti svarar hetta til eina minking á 45 tons.

Arbeiðið við at dagføra høvuðsbygningin í Klaksvík heldur fram. Í 2024 verða nýggj orkusparandi vindeygu sett í niðaru lon, samstundis sum hurðarnar í bygninginum verða skiftar. Hetta kemur at minka enn meira um orkutørvin.

Við hesum íløgum er sostatt einki beinleiðis $CO_2$-útlát frá bygningum, ið eru ogn hjá Norðoya Sparikassa.

Arbeitt verður fram ímóti, at allir bygningar, ið verða nýttir av Sparikassanum skulu hitast við varandi orkukeldum.

Miðað verður somuleiðis eftir at skifta okkara bilar út við elriknar bilar, so hvørt tørvur er á at skifta bilarnar út.







# SOSIALT
## SOCIAL

### Starvsfólk

Okkara starvsfólk eru okkara týdningarmesta tilfeingi, og tí ynskja vit í Norðoya Sparikassa at skapa eitt gott, mennandi og lokalt arbeiðsumhvørvi, har trivnaðurin er í hásæti.

Tað er okkara mál at hava ágrýtin starvsfólk, sum mennast í dagliga arbeiðinum og sum áhaldandi leita sær vitan fram og ogna sær førleikar innan arbeiðsøkið.

### Motiverað og glað starvsfólk

Hóast stutt er millum deildir og leiðslu, verða árligar trivnaðarkanningar gjørdar. Endamálið við trivnaðarkanningunum er at fáa djúpari innilit í upplivingarnar hjá starvsfólkunum.

Trivnaðarkanningarnar geva eina greiða støðumynd og eru við til at tryggja, at setast kann inn, har tað hevur størstu ávirkan at betra um trivnaðin. Úrslitið av kanningini vísir, hvussu nøgd starvsfólkini eru viðvíkjandi arbeiðsgleði og motivatión, og um starvsfólkið kann síggja seg sjálvt aftur í Sparikassanum.

Luttøkan í kanningini var 93 %.





## Góð leiðsla er umráðandi fyri trivnað og menning

Vit eru vitandi um, at góð leiðsla er umráðandi, tá tað kemur til at vegleiða og skapa rúm fyri menning. Tí verða allir leiðarar íklæddir á einum leiðaraskeiði í 2024. Endamálið við leiðaraskeiðinum er m.a. at stuðla uppundir nýggju strategiina Kós28.

## Starvsfólkasamrøður

Ein liður í at tryggja eitt gott arbeiðsumhvørvi eru árligar starvsfólkasamrøður, sum eru gjørdar millum starvsfólk og leiðarar við tí endamáli at samskifta um m.a trivnað, motivatión og førleikamenning í gerandisdegnum.

## Næmingar og útbúgving

Tað hevur týdning og gevur stórt virði fyri Sparikassan at taka næmingar inn og at eftirútbúgva starvsfólkini. Ungir eldhugaðir næmingar eru við til at skapa eitt gott umhvørvi á arbeiðsplássinum.

Í 2023 byrjaðu tveir næmingar á deildum okkara í Klaksvík og Tórshavn, og eru harvið 4 næmingar í Sparikassanum umframt ein næmingur í starvsvenjing. Hetta gevur eitt gott huglag í gerandisdegnum og er við til at menna Sparikassan.

Eisini er møguleiki hjá starvsfólkunum at eftirútbúgva seg gjøgnum skeið og útbúgving.



## Kundar

Norðoya Sparikassi ynskir at verða ein viðkomandi og persónligur peningastovnur. Tað er okkara aðalmál, at kundar altíð føla seg vælkomnar at ringja ella støkka inn á gólvið og fáa eina dygdargóða tænastu.

Tó krevur tíðin eisini, at okkara tænastur eru lætt atkomuligar, soleiðis at kundarnir sjálvir kunnu avgreiða síni fíggjarviðurskifti, har tey eru og tá tey vilja. Tí arbeiða vit eisini miðvíst við at talgilda okkara tænastur.

Tað er okkara ynski at kundin fær avgreitt síni viðurskifti skjótt og lætt.





# OKKARA TÆNASTUR Á GRØNU LEIÐINI

Føroyingar hava altíð havt eitt serligt tilknýti til náttúruna. Tí ynskir Norðoya Sparikassi at stuðla okkara kundum við grønu umleggingini, og veitir Sparikassin lán til hesi endamál við eini lagaligari rentu. Talan er um trý ymisk lán, hvørs endamál eru eitt meira burðardygt samfelag.





### Grønt bústaðarlán

Við Grøna bústaðarláninum hava kundar okkara møguleika at velja eitt lán við lagaligari rentu til bústaðin, ið verður hitaður við varandi orku t.d. jarðhita, fjarhita ella hitapumpu.



### Elbillán

Er títt næsta keyp ein elbilur, so kunnu vit bjóða tær lán til elbil, har tú fært eina lægri rentu enn á vanliga billáninum. Tað er okkara ynski at bjóða kundum okkara eina góða fígging til elbilar, soleiðis at tað skal løna seg at velja grønar loysnir og harvið stuðla grønu umleggingini.

### Orkulán

Orkulán verða veitt til tín, ið ynskir at gera orkubetrandi og umhvørvisvinarligar umvælingar á bústaðin. Orkulánið er ætlað privatkundum og kann nýtast til:

- at skifta vindeygu
- at skifta tekju ella klædning
- at bjálva bústaðin
- nýggja ella alternativa orkuskipan
- onnur orkusparandi tiltøk



# GONGDIN Í 2023

Kundar okkara hava tikið væl ímóti hesum tænastum og hava vit í 2023 sæð ein øktan eftirspurning.

**Vøkstur á 50%**
Elbillán í 2023

**Vøkstur á 326%**
Grøn bústaðarlán í 2023

**Vøkstur á 31%**
Orkulán í 2023

**Løn og lønartengd gjøld**
tkr. 37.291

**Ábyrgdarrenta**
tkr. 1.770

**Partafelagsskattur**
tkr. 5.548

### Nærsamfelagið

Í 104 ár hava vit tænt okkara endamáli í nærsamfelagnum, har vit hava ávirkað búskaparligu, mentanarligu og sosialu menningina.

Norðoya Sparikassi ynskir at vera ein viðspælari og at gera mun í føroyska samfelagnum. Tí stuðla og samstarva vit við einstaklingar, bólkar, feløg og onnur í nærumhvørvinum. Eisini vilja vit, at stig, ið annars ikki verða tikin, kunnu gerast veruleiki.

Í 2023 lótu vit meira enn 4,5 milliónir krónur í stuðli og til almannagagnlig og vælgerandi endamál í nærsamfelagnum.





### Latin stuðul





# NÆRSAMFELAGIÐ

## COMMUNITY

**Dømi um gávur og tiltøk í Føroyum**



### Føroya Sjómannadagur

Norðoya Sparikassi er høvuðsstuðul hjá Føroya Sjómannadegi, ið er eitt familjuvinarligt tiltak, ið varpar ljós á sjóvinnuna við stuttleika og gaman, og er tiltakið ókeypis.





### Tesla 3 MR-skannari

Í 2023 tók vinnan stig til at savna pening inn til ein nýggjan MR-skannara til Klaksvíkar Sjúkrahús og varð Sparikassin eisini við til at lata pening til endamálið.








### Ein dagur á grynnuni

Norðoya Sparikassi er høvuðsstuðul hjá ein dagur á grynnuni, eitt sera fólksligt tiltak. Tiltakið setur sjóneykuna á sjótilfeingið í Føroyum, og er tiltakið ókeypis.





### Minnisverk fyri deyðar barnakonur

Norðoya Sparikassi var við til at lata stuðul til minnismerki í Fuglafirði fyri allar kvinnur í Føroyum deyðar í barsilssong. Um minnismerkið skriva stigtakarnir:

„Um allan heim eru kvinnur – bæði nú og í farnum tíðum – deyðar í sambandi við barnsburð. Við minnismerkinum geva vit ofta burturtagdu søgunum um tær, ið doyðu í barsilssong, eitt jarðfast og sjónligt minni. Við hesum minnismerki minnast vit allar tær kvinnur í Føroyum, sum eru deyðar í barsilssong."

# LEIÐSLA

## GOVERNANCE

### Álítandi virkisleiðsla

Sum peningastovnur hevur Norðoya Sparikassi stóra samfelagsliga ábyrgd og ávirkan. Tí hevur tað týdning, at vera ein nærlagdur og ábyrgdarfullur peningastovnur, sum leypandi mennist. Fyri at tryggja eina sunna virkismentan, samstundis sum galdandi løggáva verður fylgd, verða starvsfólk javnan kunnað um galdandi mannagongdir og politikkir.

Sparikassin metir, at góð virkisleiðsla er ein fyritreyt fyri góðum samstarvi millum Sparikassan og áhugabólkarnar (kundar, ábyrgdarar, starvsfólk, nærsamfelagið v.m.) um at røkka góðum úrslitum. Tí heldur Sparikassin seg til tilráðingarnar frá „ráð um góða virkisleiðslu“ og Finans Danmark. Endamálið við tilráðingunum er, at støða skal takast um týðandi evnir, og at skapa størri opinleika um leiðslukarmarnar og harvið økja um álitið hjá áhugabólkunum.

### Fyristøða Sparikassans

Fyristøða Sparikassans er umboðsráð, nevnd og stjórn.

### Ábyrgdarar

Ein og hvør likamligur ella løgfrøðiligur persónur, ið setur pening í Sparikassan, kann gerast ábyrgdari í Norðoya Sparikassa við at gjalda inn kr. 1.000 í ábyrgdarpeningi. Sum ábyrgdari fær ein ávirkan á, hvør myndar umboðsráðið, sum er hægsti myndugleiki Sparikassans.

### Umboðsráðið og Umboðsráðsfundur

Umboðsráðið er hægsti mynduleiki hjá Norðoya Sparikassa. Í umboðsráðnum sita 39 umboð, ið verða vald 4. hvørt ár. Umboðsráðið er býtt í tvey øki:

- Norðoyggjar og
- Føroyar annars og útlond.

Fyri økið Norðoyggjar verða 28 limir valdir, meðan 11 limir verða valdir fyri økið Føroyar annars og útlond. Á umboðsráðsfundinum hava umboðsráðslimirnir møguleika at siga sína meining og atkvøða til val av nevndarlimum og grannskoðara umframt at góðkenna viðtøkubroytingar og ársfrágreiðingar.

### Nevndin

Nevndin hevur yvirskipaðu leiðsluna av Sparikassanum um hendi. Tað er nevndin, ið setur stjórn og harvið stjóran í Sparikassanum, og setur hon eisini tí yvirskipaðu kósina fyri Sparikassan. Nevndin hevur eisini ábyrgd av m.a. politikkum, virkisgongdum og viðurskiftum ísv. grannskoðan.

Í nevndini sita 6 limir, ið eru valdir av Umboðsráðnum og sita teir í 3 ár í senn. Upplýsingar um nevndarlimirnar eru at finna í ársfrásøgnini og á heimasíðu Sparikassans. Við ársenda 2023 vóru hesir limir í nevndini:

- Símun Absalonsen (formaður)
- Rúni Heinesen
- Frimodt Rasmussen
- Súsanna Olsen
- Annika Sølvará
- Hans Arni Bjarnason Thomsen
- Guðrið Lava Olsen (starvsfólkaumboð)
- Tummas Martin Sólsker (starvsfólkaumboð)
- Jørmund Foldbo (starvsfólkaumboð)

### Tilráðingarnevndin

Tilráðingarnevndin er undirnevnd hjá nevndini, og verður vald og mannað av nevndarlimum. Tilráðingarnevndin hevur ábyrgd av, at nevndin hevur røttu førleikar, vitan og royndir at loysa tær uppgávur, ið eru álagdar nevnd Sparikassans. Tilráðingarnevndin kemur við m.a. uppskoti um valevni til nevndina á umboðsráðsfundinum.

Við ársenda 2023 vóru hesir limir í tilráðingarnevndini:

- Rúni Heinesen (formaður)
- Frimodt Rasmussen
- Annika Sølvará
- Hans Arni Bjarnason Thomsen

### Stjórn

Stjórn Sparikassans er mannað av stjóranum, ið hevur dagligu leiðsluna av Sparikassanum um hendi.



### FYRISTØÐA HJÁ NORÐOYA SPARIKASSA






## GDPR og trygd

Tagnarskylda, dátuvernd og nettrygd hevur alstóran týdning fyri Norðoya Sparikassa. Tað er okkara skylda at handfara persónsupplýsingar um kundar og starvsfólk á ein tryggan og virðiligan hátt og undir strangari tagnarskyldu.

Okkara KT- og compliance-fólk leggja stórt arbeiði í trygdina og tagnaðarskyldina, og verða starvsfólk á awarenessskeiðum við jøvnum millumbilum kunnað um og upplærd í hvussu vit ferðast og handfara persónsupplýsingar trygt. Harumframt luttaka øll starvsfólk árliga á talgildum skeiði um dátuvernd.

## Hvítting og whistle-blower-skipan

Norðoya Sparikassi leggur stóran dent á, at arbeitt verður ímóti fíggjarligum brotsverkum so sum hvítting, mutri, sviki o.ø.

Lógin um hvítting álegði m.a. peningastovninum at hava eftirlit við hvítting. Hetta hevur Sparikassin tikið til sín og hevur sett fólk til at hava eftirlit við og forða fyri, at Sparikassin veður misnýttur til hvítting ella fígging av yvirgangi. Tí kann tað hjá kundum okkara tykjast løgið og nærgangandi, tá vit brádliga spyrja eftir samleikaprógvi, og hvar peningurin stavar frá ella skal nýtast til. Men vit eru noydd at vita, hvussu tú sum kundi nýtir okkum sum peningastovn. Hetta fyri at tryggja, at tingini eru í lagi, og fyri at skilja ímillum tað, sum er vanligt, og tað, sum er óvanligt.

Sammett við onnur lond er váðin fyri mutri í Føroyum lágur. Mutur kann bæði vera penga- og/ella tænastusvik, avnoyðsla ella serviðferð. Fyri at umgangast, at Sparikassin verður nýttur til mutur, hava vit m.a. gávu- og aðrar politikkir, ið skulu tryggja, at samstarvið millum starvsfólk og kundar er óheft og gegnigt.

Harumframt hevur sparikassin eina innanhýsis fráboðanarskipan, har starvsfólk dulnevnd kunnu boða frá sviki og øðrum. Fráboðanir kunnu m.a. vera:

- Brot á hvítvasklógina
- Brot á lógina um fíggjarligt virksemi
- Óreglusemi ísv. bókhald og innanhýsis kontroll
- Ábendingar um fíggjarlig brotsverk, m.a. skjalafalsan, svik, mutur ella líknandi

Fráboðanir kunnu skrásetast á einum portali á intranetinum og eru tað okkara compliance-fólk og nevndarformaðurin, ið fáa fráboðanina.



# ESG-LYKLATØL

## ESG KEY FIGURES

- ESG er ein stytting fyri **Environmental, Social og Governance** – Á føroyskum ein stytting fyri **Umhvørvi, Sosialt og Leiðsla**.
- ESG-frágreiðingin hevur lyklatøl, ið lýsa hvar Norðoya Sparikassi er í mun til umhvørvi, sosialt og leiðslu.
- Í ESG-leiðbeiningini hjá *Burðardygt vinnulív* ber til at lesa, hvussu tølini eru roknað.







## Umhvørvið / Environmental

| Lyklatøl | Eind | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| $CO_2$e, vav1 | t | 84 | 129 | 131 |
| $CO_2$e, vav2 | t | 46 | 35 | 42 |
| Orkunýtsla | GJ | 1.568 | 2.034 | 2.027 |
| Varandi orka | % | 16 | 10 | 7 |



## Sosialt / Social

| Lyklatøl | Eind | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Fulltíðararbeiðsmegi | FtE | 46,4 | 45,5 | 44,9 |
| Kynsfjølbroytni | % | 58,8 | 55,0 | 59,0 |
| Lønarmunur millum kyn | Ferðir | 1,2 | 1,1 | 1,2 |
| Starvsfólkaskifti | % | 8,6 | 4,4 | 2,0 |
| Frávera vegna sjúku | Dagar/FtE | 8,9 | 17,7* | 6,7 |
| Kynsfjølbroytni á leiðslutingi | % | 25,0 | 37,5 | 37,5 |

** Árið 2022 er merkt av langtíðar-sjúkrafráveru.*



## Leiðsla / Governance

| Lyklatøl | Eind | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Kynsfjølbroytni í Umboðsráðnum | % | 23,1 | 23,1 | 23,1 |
| Kynsfjølbroytni í nevndini | % | 33,3 | 33,3 | 33,3 |
| Uppmøting til nevndarfundir | % | 91,7 | 96,0 | 95,6 |
| Lønarmunur millum stjóra og starvsfólk | Ferðir | 4,9 | 4,9 | 4,9 |



NORÐOYA SPARIKASSI

**Høvuðsdeildin**
Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tlf. +298 475000
ns@ns.fo
www.ns.fo

**Deildin í Fuglafirði**
Í Støð 7
FO-530 Fuglafjørður
Tlf. +298 475000

**Deildin í Tórshavn**
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tlf. +298 475000